# Sunnudagsskúli í kirkjutíð

**Miðvágur:** Sunnudagin var fyrstu ferð at børnini í bygdini høvdu møguleika at fara í sunnudagsskúla, samstundis sum foreldrini fóru í kirkju. Tað var missiónshúsið í bygdt tóku foreldur væl undir við tí. Fleiri nýggj andlit vóru nevniliga at síggja í sunnudagsskúlanum. Ætlanin er at hava sunnudagsskúlan í Miðvági á henda hátt fyrsta sunnudag í hvørjum mánaði. Hinar dagarnar verður hann sum vanligt kl. 14 í missiónshúsinum. Broytingin er gjørd í samstarvi millum missiónshúsið og kirkjuráðið.



# 20 mió meiri í gávum

**Noreg:** Gávurnar til norsku missiónsrørsluna Norsk Luthersk Misjonssamband vóru í fjør slakar 121 mió krónur, umleið 20 mió meiri enn árið fyri. Hetta er eitt munandi betri úrslit enn í 2006, tá rørslan hevði eitt metstórt undirskot. – Eg eri bæði rørdur og takksamur yvir gávuna, sigur aðalskrivarin Ola Tulluan. Hann er spentur eftir úrslitinum fyri 2008, tí ynskið teirra er at henda gongdin skal halda fram, soleiðis at arbeiðast kann við somu ferð sum áður.

## Nýggj útbúgving í sálarfrøði

**Viðareiði: Vikuskiftið 12. til 14. apríl verður forvitnisligt skeið á Hotel Norð, har dentur verður á at menna sálarliga, sosialt, andaliga og likamliga**

Undirvísari á skeiðnum er Pauline Skeates úr New Zealandi. Hon hevur verið her áður í líknandi ørindum, og verður søgd at vera ein livandi og vælfunderaður undirvísari.

Pauline hevur áður arbeitt innan kirkjur í heimlandi sínum og hevur havt skeið í longum kring allan knøttin.

Hetta skeiðið, sum nú verður á Viðareiði, er tað fyrsta av íalt fimm skeiðum í útbúgvingini, og sum íalt tekur trý ár. Tvey skeið verða aftur næsta ár og endað verður við tveimum teimum seinastu í 2010.

Kostnaður fyri skeiðið er 4.500 krónur, tá er matur og uppihald íroknað.

Skeiðið er bæði teoretiskt og praktiskt. Føroyskur kontaktpersónur er Hilda Viderø í Klaksvík.

**sb.**



*Pauline Skeates er sálarfrøðingur og við drúgvum royndum í undirvísing*

# Fríkirkjurnar klekja sangstjørnur í hópatali



*23 ára gamla Laura Arensbak Kjærgaard er kend í talentprogram X-factor á DR 1, sum omanfyri 1,5 milliónir sjónvarpssiggjarar hava sæð. Dagliga syngur hon fyri einum minni skara, nevniliga í baptistasamkomuni heima í Århus*

**Tónleikarar og sangarar úr fríkirkjunum eru rættiliga farin at gera vart við seg í donskum tónleikalívi. Stigið úr kirkjuni og á pallin er ikki longur so stórt sum áður, meta serfrøðingar í tónleiki**

**TÓNLEIKUR**
*Snorri Brend*

**Danmark:** - Fyri meg verður trúgvin á Gud enn sterkari, tá hon verður sett saman við tónleiki, sigur 23 ára gamla Laura Arensbak Kjærgaard.

Hon er ein av teimum mongu, sum hava roynt seg í sangkappingini X-factor í danska sjónvarpinum. Samstundis við hetta er hon limur í eini baptistasamkomu í Århus.

Laura er bert ein av mongum solistum við støði í eini fríkirkju, sum ger vart við seg á danska tónleikaheiminum. Gongdin er nevniliga hon, at fríkirkjurnar eru stórir útvegarar av donskum sangtalentum.

- Ferðin frá kirkjunum til tær stóru sjónvarpssendingarnar er heldur ikki so long í dag, heldur tíðindamaðurin og rithøvundurin til bókina »Frikirker for alle«, Svend L. Madsen.

Í fríkirkjunum er siður fyri rútmiskum og fangandi felagssangum við íblástri úr USA. Hesir verða ofta leiddir av ungum talentum í kirkjuni, og sum soleiðis fáa bæði venjing og avbjóðingar í lokalu kirkjuni.

- Tí meti eg ikki, at stigið er so stórt til ein pall í eini talent-sending, sigur rithøvundurin.

### Natúrliga linjur

Laura Arensbak Kjærgaard, ið sum nevnt hevur andaliga heim sítt í eini baptista-samkomu í Århus, er bert eitt dømi av mongum.

Eitt annað kent dømi er Simon Matthew sum herfyri vann donsku Melodi Grand Prix-kappingina og talentkappingina »Scenen er din«. Onnur nøvn eru Lene Nørrelykke sum var ein av luttakarunum í »Stjerne for en aften«. Hesi hava øll røtur í donskum fríkirkjum.

Sambært rektaranum fyri rútmiska musikkonservatori'ið í Keypmannahavn, Henrik Sveidahl gongur ein natúrlig linja frá sanginum í eini fríkirkju til eitt lív í tónleikavinnuni.

- Tað tykist sum ein sera innlýsandi vegur, í mun til ta sangtradisjónina, ein hevur í fríkirkjunum við til dømis gospelsanginum, sum er ein grundleggjandi rútmisk tradisjón, sigur Henrik Sveidahl, sum sjálvur hevur havt fleiri umsókjarar úr fríkirkju-umhvørvinum.

- Í hesum umhvørvinum er eitt stórt rásarúm hjá ungum at royna ymiskt kreativt, meðan ein í fólkakirkjuni leggur størri dent á klassiskan kórsang og við konservatoriu-útbúnum undirvísarum, sum hava eina heilt serstaka hugsan um, hvussu kirkjusangurin skal framberast, sigur hann.

Umleið 25.000 danir eru í dag knýttir at einari av fríkirkjunum uttanfyri fólkakirkjuna. Tær báðar størstu eru Pinsekirken og Baptistkirken.

**Kendir sangfuglar úr fríkirkjunum:**

Laura Arensbak Kjærgaard, X-factor, baptistasamkoman í Århus

Simon Mathew, danska melodi grand prix, pinsakirkjan í Keypmannahavn

Rebekka Mathew, annar sangarin í 90'ara poppbólkinum Creamy (hin var føroyska Rannvá Joensen), pinsakirkjan í Keypmannahavn

Lis og Per, danskir topp-veteraner, Evangeliets frikirke í Randers

Ester Brohus, countrysangari, Apostolsk kirke í Hedensted

Lene Nørrelykke, "Stjerne for en aften", Metodistkirken í Århus

Lena Løbner, dansktopp-sangari, Evangelistbevægelsen i Hillerød